# Ein kjaksending uttan kjak

JAN HALDANSEN



Teir journalistar sum hava skrúvað kjaksendingina tann 25.03-2009 kl 1705 saman, eru ikki sína uppgávu vaksnir, ella gjørdu teir hana tilvitað fyri frama fyri eina partin í málinum.

Í einum kjaki skulu báðir partar verða lýstir, og báðir partar skulu kunna forsvara seg. Bjarni Djurholm umboðaði Fólkaflokkin og teirra søk. Torbjørn Jacobsen úr Tjóðveldi umboðaði somu síðu sum Bjarni Djurholm. Hvør var frá hinari síðuni, EINGIN. Var grundarlag fyri hasi sendingini????

Tað bleiv oyðslað við orðum, og Tobbi slapp ordiliga at gotta sær við at spilla landsstýrismannin í vinnumálum út, uttan so at journalisturin steðgaði honum. Sendingin skuldi jú vara til klokkan 18, so langar teymar kundu teir jú fáa.

Hví skal Kringvarpið leggja upp til samgonguslit ella rættari sagt dyrka eitt samgonguslit. At fáa ein serkønan innan økið til at lýsa málið, støðuna og koma við sínum fantasii, hattar er jú møsn. Eg velji at trúgva, at hattar var ein feilur hjá redaktørinum fyri sendingina.

Torbjørn Jacobsen helt ikki, at landsstýrismaðurin í vinnumálum var kompitentur til at velja út, hvør skuldi í nevnd hjá Atlantic Airways. Kanska kundi Tobbi greitt frá, um hann sjálvur var betri egnaður ella greitt frá, hví hann hevur so ilt í reyvini inn á landsstýrismannin í Vinnumálum.

Tómar tunnur buldra mest, og tað er nokk stytsta og besta lýsing av Torbjørn Jacobsen. Tann dagin Tobbi stóð við reyvuni frameftir í veðrið, hugdi í eitt sjókort á brúnni ímillum norsku skerini og leitaði eftir, hvar hann sjálvur var staddur, skuldi ivaleyst sagt honum, ja lat fornuftina ráða. Men sum ikki altíð, so kemur fornuftin aftaná, og tað var nokk sama kensla Tobbi hevði aftan á kjaksendingin var liðug.

Hví er tað soleiðis í Kringvarpinum, at í eina viku hevur allur tíðindafluttningut snú seg um Atlantic Airways, hvat við Jacob Vestergaard, nú hann deilir út svartkjaftaloyvir til høgru og vinstru.

Eru allir fólkafloksmenn friðaðir hjá Kringvarpinum, ella eru journalistanir ikki menn nokk til viðgerða eitt tílíkt mál.

Eg vil siga, at síðani Jón Brian Hvittfelt bleiv tíðindaleiðari, er tíðindafluttningurin blivin alt meiri einssporaður ella er tað bert nakað í eg persónliga upplivi???

Hvussu nógvir útlærdir journalistar gera sendingar við eini kjarnu í hjá Kringvarpinum???




BINDI KLUBBA KVØLD

Í Eydnuni 31. mars kl. 19:30

- Adelborg Linklett: "At vera genta tá eg var ung."
- Lovisa Ellendersen: "Bindimyosur kunnu basast!"
- Oddvørsa køku & desertdreymar: Smakkiroyndir av køkum úr bókini. Bókin fæst til keyps.
- Katrin í Geil, sniðgevi: "At sniðgeva bundnavørur!"
- MONROE skipar fyri mótasýning við luttøku av NAVIA, LISSUNI & BRÁ
- RIMMAR KØKUBORÐ Vit baka úr bókini hjá Oddvør!
- Felagssangur og skemt

*STANLEY PRÝÐIR EYDNUNA*

Atgongumerki á kr. 150,- hjá: Inn, Brá og Lissuni

SEINASTA FREIST AT KEYPA ATGONGUMERKI ER 27.03. KL. 22.00

Sunda Róðrafelag Skipar fyri


# Bindiklubbakvøld í Eydnuni

31. mars klokkan 19.30 skipar Sunda Róðrarfelag fyri bindiklubbakvøldi í Eydnuni á Oyrarbakka.

Millum tey luttakandi eru Lovisa Ellendersen, fysioterapeutur, sum fer at fortelja um hvat kunnu gera fyri at fyribyrgja bindimyosum, og um hvussu ryggurin er settur saman. Harafturat fer sniðgevin Katrina í Geil, at greiða frá um at sniðgeva bundnavørur. Adelborg Linklett fer at siga frá um at vera genta tá hon var ung, og mótasýning verður við Navia, Lissuni og Brá.

Køkur úr Oddvørsa køku og dessertdreymar vera á leskiliga køkuborðinum, umframt at skemt og felagssangur er á skránni.

Atgongurmerki kunnu keypast í Lissuni, Brá og Inn við Norðskála. Seinasta freist er fríggjadagin 27. mars kl 22.

Tað er ikki nøkur treyt at vera ein bindiklubbar. Einstaklingar eru eisini hjartaliga vælkomnir.

# Tøkk til Tjóðveldi

JOHN WILLIAM JOENSEN
formaður, í Norðoya Sambandsfelag



**- fyri at hava sett eitt sera týdningarmikið mál á dagsskrá hjá løgtinginum**

Í vikuni legði Tórbjørn Jacobsen, løgtingslimur, vegna Tjóðveldi, eitt uppskot fyri løgtingið, har heitt verður á landsstýrið um at seta serfrøðingabólk at eftirmeta broytingarnar í vallógini frá sjey og til eitt valdømi.

Tað sum mær dámar serliga væl við hesum uppskotinum er tann hátturin, sum Tjóðveldi hevur valt.

At seta eina bólk av serkønum o.ø. at viðgerða eitt uppskot, sum skal verða grundarlag fyri einum orðaskifti á løgtingi er júst rætta leiðin at ganga tá slík álvarsmál skullu viðgerðast.

Eg kundi ynskt, at slíkt hóvsemi varð sýnt, tá Føroyar vóru gjørdar til eitt valdømi. Tá var politiska skipanin tikin gísil av oddafiskunum í Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, og 1-2-3 so høvdu vit eina totalt nýggja valskipan.

Hesuferð vóni eg, at politisku grasrøturnar í flokkunum og tey, sum hava arbeitt við skipanini eisini sleppa til orðana.

Gamla skipanin hevði sínar veikleikar, men einki bleiv betri við at broyta hana til eina skipan sum - ein tepur meiriluti á løgtingi - við hjálp frá høvuðsstaðarpressuni og einum ávísum samfelagsfrøðingi hjá útvarp Føroya - trýstu oman yvir føroyingar.

Eg vóni, at løgtingslimir hesuferð velja at arbeiða seriøst - tí talan er um álvarsmál.

Eg fari ikki at siga, hvussu nógv valdømir vit skulu hava, og kanska skulu vit hava serligar løgtingssessir - sum umboða ávís áhugamál og samfelagsbólkar - eg veit ikki - men hetta hava vit nú møguleika at kjakast um - og eg siggi fyri mær eitt rættiliga áhugavert kjak.

Uppskotið hjá Tjóðveldi vendir rætta vegin, og vónandi sleppur eingin við valdsmisnýtslu at ognartaka arbeiði, sum stendur fyri framman - og skal arbeiði eydnast væl - er neyðugt at øll sleppa til orðanna.

Enn einaferð - takk fyri Tjóðveldi.

# Kaj Leo formaður í fimm ár

Í dag, 26. mars, eru júst fimm ár síðan Kaj Leo Johannesen tók við eftir Alfred Olsen sum formaður Sambandsfloksins. Kaj Leo var einasta valevni til formanssessin í flokkinum.

Landsfundurin, sum varð hildin í Lærararaskúlahøllini, endaði við at næstformaðurin í danska Vinstraflokkinum, Lars Løkke Rasmussen, helt røðu fyri sambandsfólki á landsfundinum sum varð hildin í Læraraskúlahøllini í Havn.

Síðan tá er Kaj Leo vorðin løgmaður í Føroyum, og møguliga verður Lars Løkke Rasmussen næsti danski forsætisráharrin.

*mg*



*Í dag eru júst fimm ár síðan Kaj Leo Johannesen tók við sum formaður Sambandsfloksins*